# samgongu



*Stendur tað til meirilutan av samgonguveljarunum verður sama samgonga og sami løgmaður at finna í Tinganesi í komandi valskeiði*

*Savnsmynd*



*Veljarakanningin, sum Fynd gjørdi fyri Sosialin fyri trimum vikum síðani, vísir, at meirilutin av teimum, sum hava valt ein av samgonguflokkunum, ynskja at veranda samgonga heldur fram*

*Savnsmynd*

sigldi fyri fullum seglum, tá ið Fólkaflokkurin reyk uppígjøgnum, og Javnaðarflokkurin smokkaði niðurímillum. Millum javnaðarveljarar lá Tjóðveldisflokkurin næstur hjartanum tað mesta av tíðini 1988-1999, men síðani er ynskið um at hava henda flokk sum samgongufelaga dovnað nakað og Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin eru komnir at liggja fremri. So tað ber ikki til at staðfesta, at tað í veljaraskarunum hjá hesum báðum flokkunum er eitt sínámillum ynski um ein vinstraás til at fremja vinstrahallan politikk.

Tá ið fullveldisskútan sigldi fyri fullum seglum, vóru ynskini heit um samstarv millum Fólkaflokkin og Tjóðveldisflokkin. 61 prosent av tjóðveldisveljarunum vístu á Fólkaflokkin í veljarakanning í 2000, meðan 49 prosent av fólkafloksveljarunum vístu á Tjóðveldisflokkin. Tilsvarandi tølini eru í dag 23 og 14. So ein nýggj sjálvstýrissamgonga ella fullveldissamgonga liggur ikki frammalaga hjá veljarunum hjá hesum báðum flokkunum.

Í somu kanning í 2000 vóru 63 prosent av sambandsveljarunum, ið ynsktu samstarv við Javnaðarflokkin og 40 prosent av javnaðarveljarunum, ið høvdu Sambandsflokkin fremst sum møguligan samgongufelaga. Tilsvarandi tølini eru í dag 30 og 23 prosent, so heimastýrisaspektið ella tað, at hava eina samgongu til at verja ríkisfelagsskapin tykist ikki at viga eins tungt og tá.

## Tvørgangandi samgongan – ella trunkaspæl á miðjuni

Veljararnir eru eftir hesum at døma ikki longur so upptiknir av teimum klassisku spurningunum í føroyskum politikki, men tykjast at vera væl nøgdir við samgonguna, ið onkunsvegna gleivar tvørturum tað, sum fyrr skilti veljararnar og politikarar.

Tað ber til at gera sær eina mynd, hvat slag av samgongu fær dyggastu undirtøkuna út frá seinastu veljarakanningini. Veljararnir vóru ikki bert spurdir, hvønn flokk tey helst sóu flokkin hjá sær fara í samgongu við, men eisini hvør var næstur í huganum. Leggja vit hesi tøl saman, so síggja vit fyri veljararnar hjá teimum trimum samgonguflokkunum, at har er ein dygg undirtøka fyri hetta slagið av samgongu.

Sí talvu

Millum veljararnar hjá samgonguflokkunum hevur ABC-samgongan millum 35 og 47 posent undirtøku. Kend alternativ sum til dømis sonevnda yvirtøkusamgongan ACE við Fólkaflokki, Javnaðarflokki og Tjóðveldi fær ikki meira enn 5 og 7 prosent millum ávikavist Fólkafloksveljarar og Javnaðarveljarar. Ein tradisjonell sjálvstýrissamgonga, ADE fær ikki meira enn 6 prosent millum fólkafloksveljarar, meðan ein tradisjonell heimastýrissamgonga, BCD fær ikki meira enn 4 prosent millum sambandsveljarar – og hon kemur als ikki við í myndina fyri javnaðarveljarar. Millum javnaðarveljarar fær ein tradisjonell vinstrasamgonga, CDE einans 7 prosent. Meðan ein tradisjonell høgrasamgonga ABD kemur ikki við í myndina, hvørki millum fólkafloks- ella sambandsveljarar.